## Útlendingar keypa donsk partabrøv

Útlendskir íleggjarar eiga nú triðingin av teimum fyritøkunum, sum eru skrásettar á virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn. Gongdin hevur verið tann, at danskir íleggjarar og íløgugrunnar eiga støðugt minni part av teimum donsku feløgunum, sum eru skrásett, og at útlendskir íleggjarar standa fyri einum støðugt størri parti, skrivar Børsen. Úrslitið er, at í dag eiga útlendingar 32,5 prosent av teimum skrásettu partabrøvunum.



# Mugu skerja so tað munar

**Tað dugir ikki at skerja fiskidagarnar nøkur fá prosent, tí tað byggir ikki stovnarnar uppaftur. Tí mugu munandi størri stig takast hesaferð, sigur reiðarin Anfinn Olsen, sum mælir til munandi færri fiskidagar, fleiri friðingar og upphøggingarstuðul**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Anfinn Olsen: -Munandi færri fiskidagar, fleiri friðingar og upphøggingarstuðul skulu til*

– Støðan er vánalig, og verða ikki munagóð stig tikin, fer støðan hjá stovnunum at versna uppaftur meiri, samstundis sum okkara fiskimenn rýma av landinum, tí har fáa teir meiri burturúr.

Tað sigur Anfinn Olsen á Toftum. Hann er reiðari á uppisjóvarskipunum Fagrabergi og Høgabergi, trolaranum Akrabergi og línuskipinum Stapanum og hevur í mong ár fylgt við fiskivinnuni. Nú bíðar hann eftir, hvat politikararnir fara at gera fyri at verja fiskastovnarnar, og sjálvur er hann ikki í iva um, hvat hann hevði mælt Løgtinginum til at gera, um hann sat í stólinum hjá Torbirni Jacobsen:

- Vit fáa ov lítið fyri hvønn húk og fyri hvønn troltíma, og vit noyðast at skera, so tað munar, um tað skal fáa ankra ávirkan, sigur Anfinn Olsen.

### Fleiri hættir

Anfinn Olsen heldur ikki, at tað er nóg mikið at skerja fiskidagarnar, og tí er tað neyðugt at sameina fleiri tiltøk fyri at fáa nakað munagott burturúr, sigur hann.

- *Men hvat er títt uppskot?*

- Eg hevði mælt til at taka stigið í trimum. Í fyrsta lagi eiga vit at skerja fiskidagarnar við einum tvísifraðum prosenttali, harafturat eiga vit at friða uppvakstrarleiðir hjá toski og hýsu, og í triðja lagi eiga politikararnir at játta pengar til upphøggingarstuðul fyri at keypa nøkur veiðiloyvi innaftur, sigur Anfinn Olsen.

### Menn rýma

Partar av fiskiflotanum hava leingi havt ilt við at fáa fólk, og hetta er ein dagligur trupulleiki hjá fleiri skipum. Orsøkin er, at menn støðast ikki umborð á skipunum, tí teir fáa ov lítið burturúr, og fleiri teirra velja at fara av landinum at sigla við útlendskum skipum, har teir fáa væl meiri burturúr.

Anfinn Olsen sigur, at skal fiskiflotin tillaga seg tær veksandi oljuútreiðslurnar, er tað neyðugt at fáa meiri burtur úr hvørjum húki og hvørjum troltíma, fyri at fáa fyri meirútreiðslurnar, og fyri at manningin skal fáa eina nøkunlunda hýru.

- Men fyritreytin fyri øllum er, at politikararnir taka stig, sum muna.

# Nú skal skerjing til

**– Vinnan hevur forstáilsi fyri, at fiskidagarnir verða skerdir, men tað skal gerast við skili, sigur Jóhan Páll Joensen, útgerðarmaður, sum eisini heldur, at upphøggingarstuðul kann vera ein gongd leið**



*Jóhan Páll Joensen heldur, at vinnan hevur forstáilsi fyri skerjingum nú*

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tølini á borðinum hjá Jóhan Páll Joensen í Klaksvík vísa, at skipni fáa alt ov lítið burturúr. Harafturat er tað ein dagligur trupulleiki at fáa fólk umborð á skipini. Tí tekur hann undir við teimum, sum siga, at okkurt má gerast.

- Tað er eingin ivi um, at ein niðurskurður skal til nú. Eg haldi, at tað er rætt at skerja fiskidagarnar, men tó ikki við 50 prosentum, sum hevur verið frammi. Tað má gerast við skili., tí verða fiskidagarnir skerdir 50 prosent, fær tað álvarssamar avleiðingar fyri fleiri feløg og tey, sum hava gjørt íløgurnar, sigur hann.

- Hinvegin haldi eg, at vinnan hevur forstáilsi fyri, at dagarnir verða skerdir, sigur Jóhann Páll Joensen.

### Verja og stuðul

Hann heldur, at vit eiga at leggja størri dent á at verja smáfiskin, og tá hugsar hann um bæði tosk, hýsu og upsa. Tí heldur hann, at politikararnir eiga at friða leiðir, so smáfiskurin verður vardur.

Aðrastaðni her á síðuni mælir Anfinn Olsen tí almennatil at lata upphøggingarstuðul fyri at fáa veiðiloyvi úr flotanum. Jóhan Páll Joensen sigur, at upphøggingarstuðul er avgjørt eitt amboð, sum politikararnir eiga at umhugsa.



# Gjáarfólk umvæla gamalt gróthús

Klokkan 10 fyrrapartin í morgin, leygardagin, fara fólk í áhugafelagnum Gjómanni at umvæla eitt av teimum gomlu gróthúsunum í bygdini. Hesaferð er tað tað sokallaða Ólastovugróthúsið heili í Lágunum, sum skal umvælast.

Felagið Gjómaður varð stovnað í fjør, og síðani hevur felagið laðað tvær av teimum gomlu kráunum og eitt gróthús. Harafturat hevur felagið savnað nógvar gamlar myndir og ljóðupptøkur við gjáarfólki. Ætlanin er at hava eina myndaframsýning á páskum næsta ár.